KUNNING UM DAGPENING Í HJÁLPARPAKKANUM

Farsóttin, COVID-19, fer væntandi at hava við sær, at nógv fólk gerast sjúk, og sum tilráðingarnar eru nú, fara enn fleiri at verða send í sóttarhald.

Tey, ið hava rætt til løn undir sjúku, fáa løn frá arbeiðsgevaranum, um tey gerast sjúk ella skulu í sóttarhald, meðan tey, ið ikki hava rætt til løn undir sjúku, fáa sjúkradagpening sambært løgtingslóg um dagpening vegna sjúku. Av tí at COVID-19 smittar lættliga, verða tað væntandi nógv starvsfólk, ið ikki kunnu fara til arbeiðis, og tað kann ganga serliga hart út yvir tær fyritøkurnar, sum skulu betala løn undir sjúku.

Fyri at hjálpa løntakarum eins og teimum fyritøkum, sum skulu rinda løn undir sjúku, hevur samgongan gjørt neyðugar broytingar í sjúkradagpengalógini:

1. Sjúkuhugtakið sambært dagpengalógini er víðkað til eisini at fevna um løntakarar og sjálvstøðug vinnurekandi, sum eru sett í sóttarhald av heilsumyndugleikunum, ella sum heilsumyndugleikarnir hava mælt til at fara í sóttarhald. Tað verður tó ikki endurrindað fyri starvsfólk, ið kunnu arbeiða heimanífrá. (Við øðrum orðum: Við hesari broyting fer mann eisini at kunna fáa dagpening í sambandi við sóttarhald orsakað av COVID-19).

2. Ein afturrindanarskipan er gjørd fyri privatar arbeiðsgevarar, sum gjalda løn undir sjúku. Arbeiðgevarar fáa afturgoldið lønarútreiðsluna, tó í mesta lagi við eini upphædd, sum svarar til sjúkradagpening.

3. Sjálvstøðug vinnurekandi og stjórar í egnum feløgum, sum ikki hava teknað trygging sambært dagpengalógini, fáa nú møguleika fyri at fáa dagpening frá fyrsta degi, tey tekna trygging sambært dagpengalógini. Vanliga treytin um, at mann skal vera arbeiðsførur, tá tryggingin verður teknað, verður við lógaruppskotinum ikki galdandi, um óarbeiðsføri skyldast COVID-19. Tað veri seg vegna smittuna ella vegna sóttarhald.

4. Arbeiðsgevarar rinda altíð fyri 1. og 2. fráverudag í sambandi við sjúku. Við hesum lógaruppskotinum verður tað soleiðis, at tá talan er um COVID-19, rindar landskassin frá fyrsta fráverudegi.

5. Fyri at fyribyrgja, at heilsuverkið verður lagt undir eyka trýst í hesum komandi tíðarskeiðinum, verður ein váttan frá arbeiðsgevara javnsett við læknaváttan, tá talan er um COVID-19 (bæði í sambandi við smittuna og sóttarhald).

***Skipanin áðrenn hjálparpakkan:***

1. Sjúkuhugtakið sambært verandi dagpengalóg var avmarkað til sjúku, staðfest av lækna við læknaváttan.

2. Arbeiðsgevarar, sum høvdu skyldu at rinda løn undir sjúku, fingu einki afturrindað frá landinum. T.v.s., at ein týðandi partur av føroyskum arbeiðsgevarum hevði skyldu at gjalda løn til síni starvsfólk.

3. Sjálvstøðug vinnurekandi og stjóri í egnum felagi skuldi vera arbeiðsførur fyri at tekna trygging. T.v.s., at ein, sum hevði fingið smittuna ella var í sóttarhaldi, ikki kundi tekna trygging. Tann, sum so hevði teknað trygging, skuldi síðani bíða í 4 vikur, áðrenn rætturin til dagpening tók við.

4. Sjúkradagpeningur varð goldin av landskassanum, tó so at arbeiðsgevarin rindaði 1. og 2. fráverudag.